# Ung ganga fyri einki

Arbeiðsloysið millum tey 25 til 29 ára gomlu í Danmark er nú so stórt, at fakfelagsrørslan ber ótta fyri, at arbeiðsmarknaðurin kann missa eitt ættarlið. Eftir trimum árum er arbeiðsloysið í hesum aldursbólkinum meiri enn tvífaldað, og hagtølini tann 1. juli vístu, at tá vóru 60.000 arbeiðsleys undir 30 ár. Við øðrum orðum var arbeiðsloysið í hesum aldursbólkinum næstan 10 prosent, skrivar Politiken. Sambært blaðnum vísa hagtølini, at arbeiðsgevararnir velja fólk við royndum fram um tey yngru. Tað eru serliga menn og eftirkomarar hjá innflytarum, sum ganga fyri einki.



# Brown ætlar at selja

Í Bretlandi hevur Gordon Brown, forsætisráðharri, ætlanir um at selja so mikið av almennum ognum, at sølurnar kunnu geva tí illa trongda ríkiskassanum tríggjar milliardir pund. Eitt nú ætlar hann at selja jarnbreytina millum London og tunlarnar um Ermasund, Dartford-brúnna við Thames-ánna og ein tunnil, sum er undir ánni á somu leið. Herumframt ætlar forsætisráðharrin at selja bretska partin av evropeisku fyritøkuni Urenco, sum ger brennievni til kjanrorkuverk. Tslamenn hjá stjórnini hava fyrr sagt, at aðrar sølur kunnu koma upp á tal fyri at útvega ríkiskassanum pening.



*- Eg vóni, at nýggju kommunureformurin fer at eydnast innan ásettu tíð, og at kommunali geirin soleiðis verður umskipaður, sigur landsstýriskvinnan, Annika Olsen*

# Álit um nýggjan kommunureform

**Seinnapartin fríggjadagin legði ein arbeiðsbólkur, sum landsstýriskvinnan í kommunumálum, Annika Olsen hevur sett, fram álit um ein kommunureform, har talið av kommunalum eindum í Føroyum verður sjey ella níggju – og ikki 30, sum tað er í dag**

KOMMUNUTILMÆLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Arbeiðsbólkurin mælir til, at nýggju eindirnar verða skipaðar longu 1. januar 2011, og um henda tíðarætlan heldur, verður kommunuval útskrivað til at verða 9. november 2010.

Spurningurin, hvørt tað verða sjey ella níggju kommunalar eindir hongur saman við, hvørt Kvívík og Vestmanna skulu leggjast saman við Vágum ella verða fyri seg – og um Eystur kommuna skal leggjast saman við Skálafjørðinum ella vera fyri seg, sum hon er í dag.

Landsstýriskvinnan í kommunumálum, Annika Olsen, sigur, at hon nú fer at heita á løgmann um at seta ein landsstýrisbólk at arbeiða við hesum máli, og at tað verður ein politisk avgerð, hvørt talan verður um sjey ella níggju eindir.

### Javning

Í álitinum mælir arbeiðsbólkurin til, at ein millumkommunal javningarskipan verður sett í verk, har kommunuskatturin verður hækkaður, meðan landsskatturin verður lækkaður samsvarandi. Haraftrat verður mælt til eina afturberingarskipan, har ymisku frádráttirnir verða bornir kommununum aftur.

Sambært hesum báðum skipanunum verða 705 miljónir krónur fluttar út til kommunurnar, og hesin peningur skal geva rúmd fyri, at fólkaskúlin verður fluttur út til kommunurnar at umsita frá 1. januar í 2012 og eldraøkið frá 1. januar í 2013.

Í dag er landsins partur á hesum báðum økjum ávikavist 270 og 340 miljónir krónur, sum gevur 610 miljónir krónur tilsamans.

### Umfatandi reformur

Landsstýriskvinnan, Annika Olsen, hevur góðar vónir um, at uppskotið verður framt og fer at eydnast, tó at tíðarætlanin er knøpp.

Hon vísir á, at hetta er ein so umfatandi reformur, at tað allar besta er, um hann verður gjøgnumførdur tvørtur um flokkar, tvørtur um samgongu og andstøðu – og eisini tvørtur um kommunala geiran, sum hon tekur til.

- Eg vóni, at reformurin fer at eydnast innan ásettu tíð, og at kommunali geirin soleiðis verður umskipaður.

Landsstýriskvinnan sigur, at kommunali geirin longu er skeiklaður sum er, og hyggja vit at fíggjarstøðuni hjá okkum, er reformurin avgjørt nakað, sum kann bøta um viðurskiftini hjá okkum og kann gera tingini meira gjøgnumskygd og meira rættvís.

# Havnin k
# 60 miljón

**Tórshavnar kommuna kemur við eini javning at gjalda nógv. Talan kann skjótt gerast um veldugar upphæddir. Úrslitið kann gerast, at eingin peningur verður til karmar um vinnulív og menning. - Um peningurin, sum fer til javning, ikki verður brúktur sambært lógarásettum reglum, hevði tað verið nógv betri, um miljónirnar framhaldandi lógu í "kraftsentrinum" og soleiðis kundu skapt nakað í høvuðsstaðnum, sigur formaðurin í Kommunusamskipan Føroya og borgarstjórin í Tórshavnar kommunu**

KOMMUNUTILMÆLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Heðin Mortensen, formaður í KFS, Kommunusamskipan Føroya og borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, heldur, at uppskotið hjá arbeiðsbólkinum, sum nú hevur lagt fram tilmæli um nýggjan kommunureform, er skilagott á tann hátt, at lagt verður upp til at skipa Føroyar í færri og størri kommunalar eindir.

- Tað er skilagott við færri eindum, og soleiðis sum hesin parturin av uppskotinum er háttaður, byrjar hetta at líkjast tí, sum sær út til at vera leiðin frameftir. Men okkum dámar ikki, at henda samanlegging skal gerast við lóg eftir so stuttari tíð. Seinnu árini hava vit sæð fleiri sjálvbodnar samanleggingar, og eg ivist onga løti í, at tær sjálvbodnu samanleggingarnar føra til tað góða.

Heðin Mortensen sigur, at tilmælið leggur upp til ta øvutu gongdina av tí, sum hann hevði hildið verið rættast.

- Í nógv ár hevur verið tosað um at leggja eitt nú eldraøkið út til kommunurnar at umsita, men enn er einki hent. Tað vísir seg, at har tveir partar skulu deilast um økini, dettur nógv niður ímillum, og hetta síggja vit ikki minst innan eldraøkið í Suðurstreymi, sum av álvara er afturútsiglt. Mín greiða meining er, at tann, sum skal gjalda, eisini skal valda á økinum.

### Totalur forvirringur

Formaðurin í KFS heldur, at tíðarætlanin, sum arbeiðsbólkurin skjýtir upp, er alt ov stutt, og honum dámar lítið, at tilmælið leggur upp til, at kommunuval verður aftur longu komandi heyst.

- Fleiri av nýggju bý-og bygdaráðslimunum hava bert sitið í nakrar mánaðir, og verður kommunuval longu aftur um eitt ár, er lítil ivi um, at valstríð fer at seta dám á hetta árið, ið er tað, sum vit í hesum tíðum hava allar minst brúk fyri. Hetta verður sera óheppið fyri gerandisdagin kring um í kommununum, og eg skilji ikki, hví tilmælið leggur upp til, at valið skal skundast soleiðis.

Heðin Mortensen vísir á, at í øðrum londum, har kommunur eru lagdar saman, veit hann dømir um, at gomlu bý-og bygdaráðini hava sitið tíðina út, samstundis sum nýggj fólk eru vald, ið taka við, tá upprunaliga valskeiðið er runnið.

- Soleiðis hava nýggju fólkini havt høvi at fylgja gongdini og seta seg inn í viðurskiftini, áðrenn tey